

www.oljan.fo

**Jan Müller** 25 - 05 - 2013

# Gongur væl hjá Eldborg í Afrika

Føroyska frálandaskipið Eldborg, sum herfyri setti kós suður um ekvator fyri at átaka sær nýggjar og spennandi uppgávur fyri Statoil í Eysturafrika, arbeiðir í løtuni út frá útgerðarhavnini í Nacala í Mozambique, har Eldborg veitir tænastur til boriskipið Discovery of Americas. Tað hevur gingið væl við arbeiðinum, síðani Skansi Offshore skrivaði undir avtalu við Statoil, skilur oljan.fo. Umframt at vera veitingarskip hjá Discovery of Americas luttekur Eldborg í tilbúgving í sambandi við oljurudding. Eftir hesa uppgávuna verður Eldborg partur av verkætlan at bora út fyri Tanzania við Mtware sum útgerðarhavn. Myndirnar eru frá venjing í samband við oljurudding.